**Yvirlýsing frá Sjúkrarøktaretiskum Ráðum í Norðanlondum**

Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsustarvsfólk, sum arbeiða fyri at bjarga mannalívum, eru í alt størri mun vorðin mál fyri álopum í konfliktum, har fólkarætturin og grundleggjandi menniskjavirði ikki verða vird. Sambært altjóða felagsskapum sum "Læknar uttan landamørk" eru hesi álop ein álvarsom hóttan móti bæði heilsustarvsfólkum og teirra møguleikum at røkja lívbjargandi arbeiði.

Hóast áheitanir frá ST um vápnahvíld í Miðeystri, verða áhaldandi umbønir um humanitera hjálp ikki tiknar til eftirtektar. Arbeiði hjá heilsufelagsskapum verður tarnað, og bráðneyðug neyðhjálp sleppur ikki fram til tey neyðstøddu. Nógv sivil fólk, sum sambært fólkarættinum hava rætt til vernd, mangla neyðuga hjálp og stuðul. Hetta er ein humaniter kreppa, sum krevur skjóta altjóða handling.

Verjan av heilsustovnum og sivilum undir vápnaðum konfliktum er ein grundleggjandi meginregla í fólkarættinum. Tá ið tøgn og passivitetur fær loyvi at ráða um hesi álop, er vandi fyri, at tey við tíðini verða góðtikin. Tí er tað av alstórum týdningi, at altjóða samfelagið stendur saman móti hesum gongdum og tryggjar, at meginreglurnar í fólkarættinum verða fylgdar.

Netverkið av Sjúkrarøktaretiskum Ráðum í Norðanlondum fordømir við hesum álopini á sjúkrahús, heilsustovnar, og heilsustarvsfólk í Gaza, á Vestara áarbakka og í Libanon. Somuleiðis fordøma vit harðskapi móti heilsustovnum og sivilum í londum sum Haiti, Kongo-kinshasa, Suðursudan, Miðafrikanska lýðveldinum, Bangladesh, Etiopia, Tchad, Afghanistan, Ukraina, Jemen og allastaðni, har slíkar hendingar fara fram. Vit kunnu ikki góðtaka álop á sjúkrahús yvirhøvur, og at sjúkrarøktarfrøðingar og heilsustarvsfólk eru í vanda fyri at verða dripin í royndini at bjarga lívi og limum. Vit kunnu heldur ikki góðtaka, at forðað verður fyri, at sivil fólk fáa ta verju, tey hava tørv á og rætt til.

Lilas Ali, forkvinna fyri "sjuksköterskornas etiska råd vid svensk sjuksköterskeförening"

Berit Liland, forkvinna fyri "Rådet for sykepleieetikk, Norsk sykepleirforbund"

Jana Mortensen, forkvinna "Sjúkrarøktaretiska Ráðið"

Lisbeth Aaskov Falch, Forkvinna "Dansk sygeplejetisk råd"

Pauline Olesen, Forkvinna, "Grønlands sygeplejetiske råd"